# IRF byggir út á Hagaleiti



**Viðgerð av burturkasti er nógv broytt seinastu árini, og stórar avbjóðingar liggja fyri framman. IRF hevur gjørt eina íløguætlan, sum skal setast í verk komandi tvey árini. Við hesi íløguætlan verður Brennistøðin nútímansgjørd, nýtt Spilloljuverk gjørt á Hagaleiti, eins og ein loysn verður funnin til viðgerð av rottangaevju**

Arbeiðið at útbyggja brenniovnin á brennistøðini á Hagaletið byrjar í januar 2009 og verður liðugt í mars sama ár. Ovnurin verður longdur og fær nýggja brennirist. Harafturat verður ein hópur av øðrum lutum og verkum skift út. Tá arbeiðið er liðugt í seinnu helvt av mars, hevur IRF ein so at siga ein nýggjan ovn.

- Endamálið við útbygginini er at fáa ein nútímans ovn, sum hevur hægri brenniorku enn verandi ovnur. Roknað verður við, at brennistøðin á Hagaleiti fer at kunna brenna eini 6.000 tons meira um árið, tá útbyggingin er liðug. Fyrsta árið verður tó merkt av, at nógv burturkast liggur á goymslu.

Ætlanin er, verður sagt úr Leirvík, at kundarnir mest sum ikki skulu leggja til merkis, at brennistøðin liggur still og verður útbygd.

- Innsavningin av burturkasti skal í mest møguligan mun ganga sum vanligt. Burturkastið verður síðani pakkað inn og lagt á goymslu.

Útbygda brennistøðin fer at hava ein hitamátt upp á umleið 7 MW.

- Brennistøðin veitir hita til virksemið hjá IRF á Hagaleiti og til Høvdavirkið hjá Faroe Marine Products. IRF veitir í løtuni á leið líka nógvan fjarhita sum Brennistøðin á Hjalla, og gongur framleiðslan hjá Høvdavirkinum sum ætlað, verður IRF nógv størsti fjarhitaveitari í Føroyum komandi árini.

## Spilloljuverk

Arbeitt verður eisini við ítøkiligum ætlanum um at byggja eitt nýtt verk til spillolju. Verkið skal liggja við brennistøðina á Hagaleiti og gagnnýta hita frá brenningini. Ætlanin er at byrja byggingina av spilloljuverkinum á sumri 2009.

- Hóast nýggja verkið verður munandi minni at síggja til enn gamla verkið á Kambsdali, verður orkan fleirfalt størri. Spilloljan verður viðgjørd og spillivatnið reinsað á annan hátt, og alt verkið verður undir taki. Við fullari megi kann verkið arbeiða umleið fimm ferðir so nógva spillolju, sum núverandi verk, siga tey á brennistøðini á Hagaleiti.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

**Limir í Handilsmiðdeplinum:**

- Bakaríið
- Bókabúðin
- Berglon
- Borg
- Bros
- City
- Colorama
- El-Tænastan
- Eik Banki
- Elding
- Eysturoyar heimavirkið
- FK Skálafjørður
- Hjá Sannu
- Hógv
- Jungman
- Opus
- Orkis
- Shop In
- Sju
- Tara
- Telebúðin
- Thomas Dam Búnýti
- Trend Floor
- Vodafone
- Vøruhúsið í Runavík

HANDILSMIÐDEPILIN

MENTANARVIKA

í Handilsmiðdeplinum í Runavík

Mótasýning verður í Sjókafeini hósdagin 23. oktober, byrjað verður kl. 19.30

Open by night – fríggjadagin 24 oktober er opið til kl. 22.00

Leygardagin 25. oktober er opið til kl. 17.00